

www.oljan.fo

**Jan Müller** 24 - 03 - 2013

# Vil ikki hoyra meiri um uran úr Grønlandi

Enn er ikki greitt, hvat tann nýggja samgongan hjá Aleqa Hammond heldur um ætlanina at útvinna uran úr grønlendsku jørðini, men ætlar hon at loyva hesari vinnuni, kann hon í hvussu er rokna við mótstøðu úr Danmark. Tá saman um kemur, er tað ikki landsstýrið í Nuuk, men Fólkatingið í Keypmannahavn, sum situr við tí endaliga orðinum í uran-málinum. Og í landsins størsta flokki, Vinstra, er eingin slingur í valsinum í hesum málinum. Svarið haðani er kortanei. -Vit eru sera ørkymlað av uran-ætlanini í Grønlandi. Vit hava staðfest, at uttanríkisráðharrin er í ferð við at greina avleiðingarnar og vænta at fáa hansara frágreiðing í mai. Men í Vinstra eru vit ivingarsom, og í løtuni kennir eingin avleiðingarnar av málinum, sigur fólkatingskvinnan Gitte Lillelund Bech við Infornation. Hon er framsøgufólk hjá Vinstra í grønlendskum viðurskiftum og fyrrverandi verjumálaráðharri. Ósemja í Fólkatinginum Sosialdemokratarnir og Danski Fólkaflokkurin eru ikki so órógvaðir av tosinum um uranvinnu í Grønlandi. Sosialdemokratarnir siga, at hetta er eingin trupulleiki, bara trygdin er í lagi, og støðan hjá DF er, at uran er ikki annað enn ein vanlig handilsvøra. Men hetta sissar ikki Vinstra. -Tað er Danmark, sum fær ábyrgdina av trygdini við uraninum, og tí mugu vit kanna hesi viðurskiftini til botns, áðrenn vit kunnu loyva uranvinnu í Grønlandi. Tí kunnu vit ikki bara sita hendur í favn, skuldi tann nýggja samgongan havt ætlanir um at loyva uranvinnu, sigur Gitte Lillelund Bech við blaðið. ? ?